


Torbjørn Kjus, greinari hjá DNB Markets. Mynd: DNB

# Oljuprísurin heldur fram at vera lágur í tvey ár afturat

**Jógvan Hugo Gardar**

11.08.2015 - 18:20

Oljan.fo

Oljugreinarin sum fyri tveimum árum síðani spáddi at oljuprísurin fór at kava og lækka nógv, sigur nú at ongi útlit eru fyri nakrari hækking komandi tvey árini.

Tá oljugreinarin Torbjørn Kjus, hjá DNB Markets í Oslo, fyri tveimum árum síðani vildi vera við at oljuprísurin fór at lækka á sumri í 2014, so bleiv hann hildin fyri at vera ein dómadagsapostul. Men hann helt fast uppá spádómin.

Hann helt seg síggja at marknaðurin fór at fáa ov nógva olju og at hetta kom at raka oljumarknaðin meint.

Og hann fekk rætt, hóast ongin sá tað mevan oljuprísurin lá millum 100 og 120 dollarar á várið 2014. Hesa seinastu vikuna hevur prísurin aftur veriv undir 50 dollarum fyri fatið.

Nú lurta øll eftir Torbjørn Kjus tá hann kemur við sínum metingum. Í síni fesku meting sigur Torbjørn Kjus at tey eru komin til at prísurin á oljuni á várið 2017 kemur at liggja í meðal 10 dollarar undir prisinum í ár.

I januar var metingin hjá DNB at meðalprísurin fyri eitt fat av olju kom at liggja um 74 dollarar í heyst. Men sambært dagens Næringsliv er hendan metingin nú tillaga gongdini, og nú er metingin at oljuprísurin kemur at liggja um 58 dollarar fyri fatið seinna hálvár, 55 dollarar nú í triðja ársfjórðingi og 60 dollarar í fjórða ársfjórðingi.

Og metingarnar fyri 2016 og 2017 eru enn daprari fyri tey sum ynskja at oljuprísurin skal koma uppaftur á eitt hægri støði. Kjus sigur at tað er ringt at finna góðar grundgevingar sum siga at oljuprísurin kemur at hækka til 75 dollarar í 2018 og 80 dollarar í 2017